# Jánkasligt Live Earth

Hóast tónleikanøvnini gjørdu sína skyldu, hegla atfinningarnar oman yvir fyriskipararnar. Vánaligar umstøður og vantandi áhugi prýða yvirskriftirnar kring heimin.

Risastóra umhvørvistiltakið, Live Earth, varð hildið leygardagin, og lagt varð upp til tað heilt stóra brakið. Fyriskipararnir væntaðu tvær milliardir hyggjarar kring heimin.

Og hyggur ein at skránni, so er eisini talan um tað besta av tí besta innan tónleikheimin í dag.

Nøvn sum Madonna, Akon, Red Hot Chilli Peppers, Smashing Pumpkins, Pussycat Dolls og nógv onnur gjørdu sítt til, at tónlistarligi parturin ikki lá eftir.

## Lá hyggjaratøl

Men í kjalarvørrinum av tiltakinum eru atfinningarnar nógvar.

Talið av fólki, ið sóu tiltakið, kom ikki í nær námind teimum tveimum milliardunum, ið vórðu spáddar. Í Onglandi høvdu bæði Live Aid, sum var í 2005, og konsertin til minnis um Dianu prinsessu, sum var her fyri, munandi størri hyggjaratøl enn Live Earth. 11,3 milliónir hugdu at minniskonsertini, meðan einans 3,1 milliónir hugdu at Live Earth.

Í Danmark var talið 100.000. Til sammetingar kann nevnast, at Live Aid hevði 231.000 hyggjarar.

## Í øðini

Fyriskipanin av tiltakinum fær eisini eitt skot fyri bógvin.

Í Sidney eru fólk í øðini um vánaligu viðurskiftini undir tiltakinum. Tímalangar bíðitíðir til vesini og ølfløskur fyri 200 kr. hava allarhelst gjørt sítt til, at tiltakið hevur fingið hundratals klagur síðani leygardagin.

## Endamál

Endamálið við tiltakinum er at gera fólk varhug við vaksandi hitalagstrupuleikan, sum síðani skal elva til eina hugburðsbroyting viðvíkjandi burturkasti o.ø.



*Madonna framførdi á Wembley í samband við Live Earth og fekk sera góð ummæli*

*Mynd: polfoto*

**FAKTA**

**- Tiltakið var hildið 7. juli**

**- Í 24 tímar spældu fleiri enn 100 kend tónleikanøvn í 7 heimspørtum**

**- Endamálið er at gera vart við vaksandi**

# Løgreglan kannar narkoring

**Onkur er varðhaldsfongslaður, og leiðarin á kriminaldeildini hjá løgregluni váttar, at arbeitt við onkrum**

NARKO
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*




*Løgreglan er ógvuliga sparin við upplýsingum um sonevnda »narkoringin«*

*tilvildarlig savnsmynd*

Seinastu tíðina hava søgur gingið um, at ein narkoringur er avdúkaður í Føroyum. Ógreitt er hvussu stórur hesin ringur er, hvussu nógv fólk hann umfatar og hvussu nógv rúsevni talan er um.

Á kriminaldeildini hjá løgregluni eru tey eisini ógvuliga sparin við upplýsingum. Tað er einans leiðarin á deildini, Bergleif Brimvík, sum kann úttala seg og honum fæst ikki nógv burtur úr. Hann sigur, at tað er so ógvuliga avmarkað hvat hann fær sagt.

– Men eg kann vátta, at vit arbeiða við onkrum, sigur hann.

Meira fæst ikki burtur úr honum. Hann ynskir ikki at viðmerkja hvussu nógv fólk talan er um, og ei heldur, um hvussu nógv og hvørji rúsevni eru upp í blandað.

Heldur ikki fær Bergleif Brimvík sagt nakað um, hvørt hetta mál minnir um stóra rúsevnismálið, har dómur fall 14. mai, og millum annað ein kvinna fekk tvey ár handan rimar fyri keyp, sølu og innsmugling av rúsevnum.

Hann vísir bara til omanfyristandandi svar, um at arbeitt verður við onkrum.

Sosialurin veit tó, at fólk eru handtikin og varðhaldsfongslað í hesum málið, og Sosialurin fer eisini at fylgja málinum upp, tá meiri er at frætta um tað, sum í løtuni verður rópt ein »narkoringur«.

# Sunda kommuna heiðraði sínum



*Bogaskjúttar, judoíðkarar og byrsumenn vórðu heiðraðir á vøllinum í Streymnesi í gjár*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

**Í gjárkvøldið vórðu oyggjaleikaluttakararnir úr Sunda kommunu heiðraðir við blómum og røðu**

OYGGJALEIKIR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað var í samband við seinnu hálvfinaluna í steypakappingini, sum var spæld á vøllinum í Streymnesi í gjár, at oyggjaleikaluttakararnir úr Sundalagnum vórðu heiðraðir.

Í hálvleikinum komu bogaskjúttar, judoíðkarar og byrsumenn inn á vøllin. Formaðurin í trivnaðarnevndini í kommununi, Asbjørn Djurhuus, helt røðu fyri teimum. Hann gleddist millum annað um, at ein lutfalsliga stórur partur av gylta fonginum á Rhodos var endaður í Sundalagnum, og at Sundalagið hevði annað at bjóða uppá enn bara fótbólt.

Síðani fingu íðkararnir blómur handaðar, áðrenn tey vóru klappað av aftur vøllinum.